# Bíða eftir Norrönu

**Tað viðraði ikki serliga væl hjá Norrönu at koma til lands gjáramorgunin. Nógvur vindur var fyrst á morgni, og tí tók skiparin eingi óráð inni í havnalagnum. Skipað var tí seinkað nakrar tímar**

FERÐAVINNA
*Snorri Brend*



*Tey bíða við tolni eftir at bussurin skal føra tey umborð á Norrönu, har harmonikutónleikur bíðar teimum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Umborð á Norrönu bíðaðu mong ferðafólk eftir at sleppa í land, men á landi bíðaði eisini hópurin av fólki sum skuldi umborð á flaggskip okkara.

Smyril Line hevði nevniliga lýst við einum harmoniku-túri aftur og fram til Bergens. Og líkt var til, at fólk veruliga hava sæð fram til henda túrin. Út ímóti 800 fólkum høvdu nevniliga bílagt sær ferðaseðil til henda serstaka túrin.

Men í gjáramorgunin skikkaði veðrið sær soleiðis, at Norröna fyrst kom at landi um 9-tíðina, tá ein lítil skái var. Men Smyril Line lat ikki fólkini vera eftir svong og heimleys.

Ístaðin fyri fekk felagið skipað soleiðis fyri, at ein partur ferðafólkunum vórðu flutt við bussum aðrarstaðir, - eini 300 niðan á Hotel Føroyar og eini 80 á Sjómansheimið, har morgunmatur stóð fyri teimum.

Hetta kom helst væl við hjá mongum, tí fleiri teirra komu av bygd og vóru farin árla frá húsum fyri at vera í nóg góðari tíð í Havn.

Men øll henda seinkingin mundi kortini vera gloymd, tá Norröna um 11:30-tíðina legði frá landi til Bergens.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 35, 2005
www.kaupthing.fo

# Ódn trýstir oljuprísin upp

MARKNAÐARRÁK

Prísurin á Brentolju helt sær oman fyri 65 dollarar fyri tunnuna tað mesta av farnu viku. Sum ofta nevnt, er stórt trýst á framleiðsluni, sum illa megnar at nøkta tann stóra eftirspurningin. Hetta trýstið ger, at hvør lítil avmarking av framleiðsluni, til dømis orsakað av verkfalli, illveðri ella tílíkum, minkar um samlaða útboðið av olju á marknaðinum. Oljukeyparar eru tí sera bangnir fyri tílíkum avbrotum, so hvørja ferð tað bert frættist um vanda fyri til dømis illveðri, hækkar oljuprísurin. Tað er júst illveður, sum heldur oljuprísinum tætt við 70 dollarar fyri tunnuna í løtuni. Hesuferð ódnin Katrina, sum steðgaði pørtum av oljuframleiðsluni í meksikanska flógvanum.

### Lánsbrævarentur einki greitt rák enn

Í farnu viku lækkaði danska 10-ára rentan frá 3,18% til 3,13%. Hækkandi oljuprísurin hevur sín part av ábyrgdini. Annars er marknaðurin enn merktur av summarfrítíðarhýri, og lánsbrøvini hava verið uttan eitt greitt rák síðan juni (sí mynd).

### Partabrøv lækkað av oljuprísinum

Heimsins partabrævamarknaðir eru eisini raktir av høga oljuprísinum, tí íleggjarar í løtuni eru bangir fyri, at oljuprísurin kann ávirka búskaparvøksturin. Onnur orsøk til lækkandi partabrøv sást fríggjadagin, tá heldur vánalig lyklatøl úr USA og ein nakað neilig røða frá Greenspan vóru kunngjørd. Partabrøv hava staðið seg væl í seinastuni. Tí er tað ikki so løgið, at hesi eru lækkaði, nú rentan er lækkað nakað aftur. Trýst kann tó lættliga koma á rentuna, so hon aftur fer at hækka. Hetta kann skjótt føra við sær keypsáhuga á partabrævamarknaðunum.

### Hesa vikuna

Í Evropa hendir lítið hesa vikuna. Tað verður tí USA, sum setir dagsskránna. Haðani koma álitistøl umframt arbeiðsmarknaðarfrágreiðingina fríggjadagin, sum væntandi fer at vísa ein sunnan arbeiðsmarknað. Tølini í hesi frágreiðingini hava tó lyndi til at sveiggja nógv, og tí kann røring koma í fíggjarmarknaðirnar orsakað av henni.

**Donsk 10-ára renta**




**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Gjaldoyru**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| USD | 605,70 | 1,0% | ↑ |
| JPY | 5,53 | 0,8% | ↑ |
| GBP | 1.094,04 | 0,5% | ↑ |
| NOK | 94,17 | -0,2% | ↓ |

**Íløgufeløg**

| | Kursur | +/- % | |
|---|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 104,56 | 0,7% | ↑ |
| Evru Lánsbrøv | 174,53 | 0,0% | → |
| Norrøn Partabrøv | 96,99 | -2,7% | ↓ |
| Altjóða Vøkstur | 66,45 | -0,2% | ↓ |

*Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðirnar.*